umhvørvisstovan

SUNDA KOMMUNA
OYRARBAKKAVEGUR 3
POSTBOX 10
405 OYRARBAKKI
FØROYAR

Argir hin 23. mai 2013
Málsnr.: 10/00756-23
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Heidi Hansen

**Spillivatnsætlan góðkend**

Við hesum skal verða boðað frá, at Umhvørvisstovan hin 23. maj 2013, sambært § 18, stk. 2 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, og í § 4, stk. 2 í kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn, hevur góðkent spillivatnsætlanina hjá Sunda kommunu fyri tíðarskeiðið 2011-2015.

## 1. Umsókn og viðgerð

Umhvørvisstovan fekk hin 17. desember 2010 spillivatnsætlanina hjá Sunda kommunu til góðkenningar (US mál nr. 10/00756-1).

Í sambandi við viðgerðina av ætlanini, hevur Umhvørvisstovan samskift við kommununa, og hin 30. mars 2012 fekk Umhvørvisstovan eina dagførda ætlan (US mál nr. 10/00756-15) til góðkenningar. Í dagførdu ætlan varð tó upplýst, at kommunan, av fíggjaligum áðum, ikki bleiv liðug við at fáa spillivatnsviðurskiftini í rættlag innan 2015, eins og ásett er í § 4, stk. 4 í spillivatnskunngerðini. Tískil fekk kommunan hin 25. juni 2012 skriv frá Umhvørvisstovuni (US mál nr. 10/00756-20), har boðað varð frá, at Umhvørvisstovan, vegna tíðarætlanina, ikki kundi góðkenna ætlanina hjá Sunda kommuna.

Hin 17. mai 2013 fekk Umhvørvisstovan skriv frá Sunda kommunu (US mál nr. 10/00756-22), har upplýst varð, at kommunan á býráðsfundi hin 29. apríl 2013 hevði samtykt at broyta tíðarætlanina í spillivatnsætlanini, og at kommunan verður liðug við spillivatnsskipanina innan 2015.

Av tí at tíðarætlanin nú er broytt, verður út frá eini heildarmeting av upplýsingunum í dagførdu ætlanini mett, at komandi spillivatnsskipan í kommununi lýkur ásetingarnar í §§ 8-13 í kunngerðini um spillivatn, og kann Umhvørvisstovan tí góðkenna spillivatnsætlanina hjá Sunda kommunu.

Góðkenningin umfatar einans krøv, sum eru ásett í kunngerðini, t.v.s. tann umhvørvisliga partin av spillivatnsætlanini. Góðkenningin tekur ikki støðu til hvørjar tekniskar loysnir eru valdar, og um teknisku viðurskiftini sum heild eru í lagi, so sum dimensionering o.s.fr. Hetta er ábyrgdin hjá kommununi.

Um tað seinni vísir seg, at spillivatn elvir til dálking, smittuvanda, uppsavnan av evnum og tilfari, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum, skal kommunan, sambært § 10, stk. 3 í kunngerðini, fremja bøtandi atgerðir, so sum økta reinsing ella føra spillivatnið longur út.

## 2. Kunngerð og kæra

Góðkenningin kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum innan 4 vikur frá tí, at góðkenningin er alment kunngjørd.

Kæra skal sendast til Umhvørvisstovuna, sum síðan sendur kæruna til landsstýrismannin við neyðugum skjølum.

Kærurætt hava tey, sum avgerðin hevur týðandi persónligan týdning fyri.

Avgerðin verður lýst á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni og við almennari lýsing.

Suni Petersen, deildarleiðari

/

Heidi S. Hansen, umhvørvisviðgeri

**Avrit:** Landslæknin, Sigmundar gøta 5, Postboks 9, FO-110 Tórshavn